# *Hent at vita í sambandi við andlát*

***Í Covid-19 tíðarskeiðnum 2020-2021***

SJÚKRAHÚS
VERKIÐ

Við deyða og jarðarferð er nógv hjá teimum avvarðandi at taka støðu til. Hesin faldarin er ætlaður sum hjálp til avvarðandi, at gera neyðugu fyrireikingarnar.

*Í Covid-19 tíðarskeiðnum skulu avvarðandi og starvsfólk á LS, eisini taka hædd fyri Covid-19 í mun til andlát. Avvarðandi verða biðin um at fylgja almennu tilmælunum um frástøðu, munnbind og somuleiðis tilmælum um sóttarhald, um avvarðandi koma uttanlands frá.*

Eftir andlátið skulu avvarðandi seta seg í samband við Kapellið á tlf. 304580. Uttanfyri vanliga arbeiðstíð ber til at ringja 304500, lokal nr. 5888.

## Kista og líkklæði

Tey avvarðandi mugu sjálvi bíleggja kistu og líkklæði so skjótt til ber.
Sí yvirlit á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum.
Tað ber eisini til at verða klæddur í egin klæðir, tá skulu avvarðandi koma við klæðunum til Leiðbeiningina so skjótt til ber.

## Avvarðandistova

Ynskja avvarðandi at síggja tann deyða, meðan líkið stendur undir børu, er neyðugt at avtala tíð við ta deildina har andlátið varð (gerandisdagar frá kl 8 - 15).
Tey avvarðandi taka støðu til, um nakar skal síggja tann deyða í kistuni og nær kistulokið skal leggjast á. Í Avvarðandistovu eru umstøður til at áleið 10 fólk kunnu savnast.

*Vegna Covid-19 støðuna ber ikki til at hava bønarhald í Kapellinum.*

Avvarðandi eiga at siga Kapellinum frá nær tey ætla at kistan skal heintast, sí tlf-upplýsingar omanfyri. Kapellið skrásetir síðan heintanina.

Avvarðandi kunnu sjálvi avtala við prest/samkomuleiðara um at halda eina bønarløtu ella kórseting, tá kistan kemur í kirkjuna/samkomuhúsið.

## Lýsing

Kringvarp Føroya hevur tel. 347500 og teldupost andlat@kvf.fo.

## Gravarar

Boða gravaranum í viðkomandi øki frá skjótast til ber.

## Líkbilur

Avvarðandi avtala flutning við líkvogni við at seta seg í samband við føraran av líkvogninum hjá avvarðandi kommunu.
Flutningur við kommunala líkvogninum er ókeypis.

## Blómuprýði

Um kistan skal prýðast  við blómum, kann børuprýði bíleggjast frá einum av blómuhandlunum. Tey syrgja fyri, at blómurnar koma í kapellið.

## Fráboðan

Landssjúkrahúsið boðar myndugleikum og Skiftirættinum frá andlátinum. Í samband við andlát verða klæðir latin teimum avvarðandi, í meðan allir virðislutir verða latnir Skiftirættinum, soleiðis at teir gerast partur av deyðsbúgvinum.

## Stuðul

Heilsutrygd veitir stuðul til gravarhjálp smb. umsókn, tó í mesta lagi 5.000 kr.
Sí www.heilsutrygd.fo

*Les meira og sí ofta settar spurningar á heimasíðu okkara www.ls.fo/andlat.*

*Við samkenslu*

Dagført juni 2021 —Uttanlandstænastan